# Desperatión

DAN R.
PETERSEN



Sitandi formaður í F.F. er í øðini, tí sjómenn hava kosið sær eitt valevni, ið fer at koppa honum. Og so kallar hann seg demokrat í Útvarpinum.

Fyri fyrstu ferð í 18 ár rillar stólurin.

Í blaðgrein 17.11. sigur hann meg vera desperatan eftir at blíva formann í F.F. Lat meg sláa rimmarfast, at eg ongar persónligar ambitiónir havi um henda postin. Eg eri í einum góðum starvi og havi ongantíð trivist betur. Men hesi árini, eg havi siglt, havi eg sæð, hvussu nógv liggur á láni hjá Óla. Í 4 ár havi eg loddað stemningin fyri formanninum millum skipsfelagar, og hann er akkurát 0.

Alla hesa tíðina eri eg biðin um at stilla upp, men havi sagt nei. Í telefonini og á fundum havi eg roynt at purra mannin út. Uttan úrslit. Tá so menn byrja at ringja av skipum nú í heyst og kæra sína neyð, játti eg. Mótsett Óla so kenni eg umstøðurnar hjá sjómonnum á egnum kroppi, eg havi tilfar at vera í blaðkjaki í hálvantriðja mánað út í eitt, og eg havi orku til tað.

Eg havi onki at missa, men fær sitandi formaður 3 ár aftrat, sum hann ætlar, so verður sjómaðurin tann stóri taparin, og tað hevur hann ikki uppiborið. Bara tí stilli eg upp.

Eg skal venda aftur til kryvjimaskinurnar, tí sjálvandi lýgur undirritaði ikki.

Hóast Óli er í øðini, helt eg, at eg skuldi vitja hann ein dagin. Tað gekk ikki, sum eg ætlaði. Tað er eisini ein spennandi søga, sum kemur seinni. Tí verður hetta framhald.

# Kommunusamanleggingin – miðvíst arbeiði í leysari luft

JÓGVAN
Í LØÐUNI
Eiði



Kommunusamanleggingin verður soleiðis borin fram, at fólk standa eftir við eini óprógvaðari sannføring um at kommunusamanlegging er gull og grønar líðir har sokallaði "kraftsentur" spíra og spríkja upp mest sum av sær sjálvum, íbúgvandi megin í lokal- og heimstaðarkennsluni er ikki brúk fyri longur.

Tað merkisverda við hesum miðvísa samanleggingararbeiði er at eingin ítøkiligur positivur og negativur listi hevur verið at sæð, meðan orð hava ikki trotið í luftini um allar teir ókendu møguleikarnar ið fólkið kann vænta sær, saman við ikki heilt sørt av ókendum vanlukkum um ikki treytaleyst verður tikið við lovaðu leysu lyftunum.

Tað einasta fasta í hesum málið er ein leys giting um hvat skal leggjast út til kommununar - kommununar vita ikki og løgtingsmenninir vita heldur ikki.

Um eg ditti mær at gita um t.d. skúlamál fella 100% til kommununar, so verður ikki bert talan um eitt lønarkontór, men um starvsnormeringar við tilhoyrandi lønarútreiðslum – tá kemur heilt vist at standa á teimum barnafátøku skúlunum og kommunustýrislimunum í teimum "víðu" kommununum, eingin ivi um tað – kanska eisini á teimum bygdunum ið eru nær uppat hvørjari aðrari, sum t.d. Sandavágur/Miðvágur, Leirvík/Gøtudalur og Toftir/Runavík.

Eldraøkið líkist nakað skúlaøkinum, við kommunalari luttøku við bygningunum. Um tað verður lagt út í fullum líki, so slepst neyvan undan at javna okkurt eftir muninum millum gamalt og ungt fólk, serliga sunnanfjørðs. Hetta sigur so mikið, at innlendismálaráðharrin eigur at byrja við tí sunnara endanum á kommunumálunum. Tann norðari endin er ikki so ringur at greiða, um ikki annað so greiðir hann seg í sjónum.

Tað sum kundi verði gjørt, er at lati Tórshavnar kommunu tikið størri partar á seg sum tað fyrstu royndina. Sandoyggin hevði verið eitt gott og veruligt royndarøki í verandi líki.

So hvørt sum Norðanfjørðs verður bundið uppaftur tættari saman, so dragnar Sunnanfjørðs samsvarandi longur burtur. Hetta elur í okkum norðanfjørðs eina spakuliga ótilvitaða skuldarkennslu, sum kann skapa grundarlag fyri eini neyðugari tilgongd um serlógir fyri Surðuroynna. Hesa tilgongd síggja vit longu nú í tí politisku havsbrúnni.

Kommunumálaráðharrin eigur at leggja sína orku í okkurt slag av kommunupakka fyri Suðuroynna við serlógum samtyktum av løgtinginum, møguligt sum eina kommunu, um tað er best fyri Suðuroynna. Kommunal inntøkujavning í oynni kundi verið í pakkanum, um talan verður um fleiri enn eina kommunu.

# Uppgávur hjá aktingarmanninum

*Djóraverndarfelagið*
*Sóley Haraldsen*

Vit vilja við hesum skrivi upplýsa øllumum hvussu arbeiðsøki hjá aktingarmanninum í Tórshavnar Kommunu er :

**1.** Blívur hundur upptikin av aktingarmanninum er arbeiðsgongdin hendan :

Um hundurin hevur hundatekin við navnið og tlf ella chips, blívur eigarin uppringdur um at koma og avheintað hundin á politistøðini. Fyri at fáa hundin útflýggjaðan skal eigarin gjalda 300 kr.

Útflýggjan av hundum fer fram á politistøðini kl 9 00 og kl 16 00 seinnapart gerandisdagar.

Um hundurin ikki verður heintaður til avtalaða tíð, kann aktingarmaðurin geva nýggja tíð, fyri meirikostnað fyri eigaran.

Hevur hundurin ikki spjaldur ella chips verður hundurin havdur í varðveitslu í 3 dagar. Vistarhaldið fyri samdøgrið er 125 kr. Eisini verður lýst um hundin, har upplýsningar um slag stødd og farvu eru. Talvan har lýst verður á hongur á býráðshúsinum í gongugøtuni, og verður nevnd svarta talva.

Er hundur burturblivin skal eigarin ringja til politistøðini, teir liggja inni við øllum upplýsingum um hundurin er upptikin.

**2.** Fyri kettur, gæs, høsn og onnur smádýr, er sama mannagongd, men tó verður dýrið haft í varveitslu í 8 døgn. Upptøkugjald er 125 kr. vistarhald er 35 krfyri samdøgrið.

Sera sera umráðandi er, at fáa kettur chips merktar, tá erfaring vísur at hálsbond oftani detta av, og tískil hevur aktingarmaðurin ongan møguleika fyri at síggja hvør eigur kettuna.

**3.** Seyður, verður eisini lýst í 8 dagar. Upptøkugjald er 125 kr. Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur, tey fyrstu 6 samdøgrini er 60 kr og síðan 35 kr. Seyður verður útflýggjaður á varveitslustaðnum.

**4.** Ross og onnur stórdýr, útflýggingargjald 600 kr. Fóður fyri hvørt nýkomið samdøgur dýrið er í varveitslu (uttandura) 125 kr.

Aktingarmaðurin og politiði taka støðu til um yvamál eru t.d. viðvíkjandi tali av djórum og varðveitslutíð.

# Framtíðar flogvøllur á Skorðhæddini

ALFRED
OLSEN
Løgtingsmaður fyri
Sambandsflokkin



Spurningurin um ein framtíðar flogvøll í Føroyum er nú blivin aktuellur aftur, millum annað av tí útbygging av Vága lufthavn sum nú verður framd og av flogvanlukkuni á Stord.

**Trygdin**

Tað er at fegnast um, at flogskipararnir blanda seg uppí, og siga sína meining um flogvallaviðurskiftini í Føroyum, og eg eri vísur í, at allir føroyingar eins og flogskipararnir, fyrst og fremst hugsa um trygdina í flogferðsluni, so líkamikið hvar ein komandi flogvøllur verður bygdur, so er fyrsta kravið, at trygdin innan øll økir í flogferðsluni er í lagi.

**Vága Floghavn**

Vit hava flogvøllin í Vágunum, sum ætlanir hava verið frammi um í nógv ár at forleingja og nútíðargera, tó at einki er komið burtur úr. Nú sær út til, at vit endiliga fara í holt við at forleingja sjálvan vøllin og nútíðargera onnur viðurskifti, sum hava við flogvøllin at gera, og tað haldi eg er uppá hægstu tíð.

**Komandi flogvøllur**

Men hvar er so besta plássið at leggja ein annan flogvøll í Føroyum? Er tað í Søltuvík, á Skorðhaddini, ella á Glyvursnesi?

Sjálvandi skulu allir møguleikar kannast, og sjálvandi skal flogvøllurin gerast har trygdin er best, og atkomumøguleikarnir góðir, bæði hjá ferðafólki og farmi. Eisini mugu atlit takast til, at flogvøllurin ikki verður bygdur á einum staðið, sum viðførur at mjørki hylir hann og verandi flogvølli samstundis.

Skulu flogvallirnir tí eisini vera eitt alternativ til hvønn annan í samband við trupulleikar við komu og fráferðir tá mjørki er, so er Skorðhæddin og Vágarnar allarhelst besta loysnin.

**Myndugleikarnir**

Tað er tí ein sjálvfylgja, at allir møguleikar skulu kannast, hvar ein komandi flogvølli í Føroyum skal gerast, og tí undrar tað meg, at Bjarni Djurholm landsstýrismaður, sáldar Skorðhæddina frá longu nú og sigur, at ein framtíðar flogvøllur ikki blívur bygdur á Skorðhæddini, við at boða frá, at kanningarnar hvar ein framtíðar flogvøllur í Føroyum skal gerast, koma ikki at umfata øki á Skorðhæddini.

Hetta er einki minni enn ein skandala, og farið eg tí at heita á Bjarna Djurholm, um at hava Skorðhæddina við í kanningunum, vísandi til, at Skorðhæddin av serfrøðingum hevur verði søgd at vera tað besta ella næstbesta plássi til ein framtíðar flogvøllur í Føroyum.

**Flogkunnleikin**

Eg meti eisini, at flogskipararnir, saman við allari aðrari serfrøði innan flogferðslu, eiga at vera við til at siga, hvar ein komandi floghavn í Føroyum, trygdarmessiga og funktionelt liggur best.

**Framtíðar floghavn**

Útvarp Føroya segði á middegi hósdagin, at ein lendiskanning, sum eitt norskt felag hevur gjørt, hevur staðfest, at Skorðhæddin ikki er egnað sum øki til ein alternativan flogvøll. Tí eru veðurstøðir settar upp á Glyvursnesi og í Søltuvík, sum skulu gera veðurmátingar á økjunum næstu árini. Sostatt er Skorðhæddin avskrivað uppá blankt papír, og áðrenn politiski myndugleikin er sloppin til orðana um hvar kaningarnar um framtíðr flogvøll skulu gerast.

Fyri mær sær tað út sum, at avgerðin um framtíðar floghavn er tikin úr hondunum á politiska myndugleikanum, og ístaðin verður tað eitt norskt felag, sum skal avgera tann spurningin.

**Allir møguleikar kannast**

Sjálvandi skulu øll økir har ein framtíðr flogvøllur í Føroyum kann gerast kannast, og tí er tað óforsvarligt at avskriva Skorðhæddina, sum av serfrøðingum hevur veri mett sum eitt tað besta økið at byggja flogvøllin á.

Tá so kanningarnar eru lidnar, vilja úrslitini vísa, hvar tryggasta plássið er at gera eina framtíðar floghavn til ferðafólk, postflutning, vøruflutning og loftvegis útflutning av fiskaframleiðslu, sum vil vera tann fíggjarligi grundstuðulin undir floghavnini.

So Bjarni Djurholm, lat Skorðhæddina vera ein natúrligan part av kanningunum um hvar besta og tryggasta plássið er til framtíðar floghavn í Føroyum.